Dansifelagið Fótatraðk

**Øskudólgur og teir góðu hjálparnir**

1.Árla var um morgunin,
sól á fjøllum skínur,
Kongur gongur av høllini út
við øllum monnum sínum

*Latið meg sova á tínum armi,*
*ríka Jomfrúva.*

2.Kongur gongur av høllini út
við tignarstavi í hendi:
Hvør kann smíða skipið tað,
sum siglir á sjógvi og landi!

3.Tann, sum smíðar skipið tað,
sum siglir á sjógvi og landi
festir helvt av ríki mínum
og dóttir í hjúnarbandi.

4.Gevið ljóð og lýði á,
eg kvøði sum eg kann,
kvøði um hann øskudólg,
sum kongadóttir vann.

5.Brøður tveir teir royndu seg,
tíðir munnu líða.
Ikki eydnaðist teimum báðum
skip til kong at smíða.

6.Øskudólgur bað lova seg
roysni tað at inna.
Hann skuldi byggja skipið tað
og kongadóttir at vinna.

7.Ikki mundu brøður halda,
hann kundi tað roysni gera.
Hann kundi fara í øskuna,
har hann var vanur at vera.

8.Gekk hann sær á skógina burt
alt fyri uttan ekka.
Møtti honum gamal maður har.
Hann gav honum mat og drekka.

9.Svøvnur legðist á Øskudólg
hann svav tann blundin blíða.
Tá ið hann vaknar úr svøvni upp,
tá var skipið smíðað.

10.Vindur hann síni segl í rá,
í kongsins garð hann sigldi.
Hann tók allar umborð hjá sær,
sum honum fylgja vildu.

11.Fyrsti var svangur og annar tystur,
triði hoyrdi grasið grógva,
fjórði hann hevði eygu so góð,
fyri honum kundi eingin seg krógva.

12.Fimti hann var lættur sum dún,
hann vildi so illa flúgva.
summar sjey og vetrar fimtan
í sætta mundi búgva.

13.Komu teir í kongsins garð,
skart og skreytir skína.
Eg skal festa ríkið hálvt
og kongadóttir tína.

14.Líti mundi Kongi dáma
dóttir burt at geva.
Roysni nógv tú fremja mást,
skalt tú hennar maður verða.

15.Alt, ið Kongur legði á,
Øskudólgur framdi.
Vinirnir teir hjálptu honum,
har var so lítil vandi.

16.Kongur mátti sannað tað,
ei betri mann hann fann.
Ríki hálvt og Kongadóttir
Øskudólgur vann.

17.Drukkið varð til teirra brúdleyp,
fall so væl í lag.
Eingin heim til húsa fór
fyrr enn triðja brúdleypsdag

18.Nú skal lætta ljóðið av,
ei kvøða meira eg kann.
Kvøðið er um Øskudólg,
sum Kongadóttir vann.

This document was created with Win2PDF available at http://www.win2pdf.com.
The unregistered version of Win2PDF is for evaluation or non-commercial use only.
This page will not be added after purchasing Win2PDF.